# Vestmannakonur hátíðarhalda kvinnudagin

Triðja árið á rað skipar ein bólkur av vestmannakonum fyri 8.marshaldi. Hini árini hevur undirtøkan verið sera góð, umleið 200 gestir úr øllum ættum, og heilt nógv hava longu boðað frá luttøku. - Vestmanna hevur verið kend sum ein bygd, har konur hava gingið undan í verki, og tí halda vit, at tað er ein sjálvfylgja, at kvinnudagurin verður hátíðarhildin her í bygdini, siga kvinnurnar, sum fyrireika kvinnudagin í Vestmanna.





*Silver Fjord, fyrrverandi Star Saga, sum er vorðin fastur táttur í bygdamyndini á Toftum – tvær ferðir um vikuna*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*





*Ingun Olsen er stjóri í Fresh Link, og Andreas F. Hansen er nevndarformaður . Tað eru Valhalla og Rainbow Seafood, sum eiga partapeningin í Fresh Link*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Stjóraskifti hjá Faroe Bunkers

OLJA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sambært Skráseting Føroya er Janus Rasmussen ikki longur stjóri hjá P/F Faroe Bunkers í Fuglafirði. Stjóraskifti hevur verið, og nýggjur stjóri er Niels Juel Nattestad, sum eisini er stjóri í Statoil.

Tað var upprunaliga pelagiska vinnan í Føroyum, sum legði grundarlagið undir virksemið hjá Faroe Bunkers í Fuglafirði, sum nú er ført fyri at veita tungolju til brúkarar.

Í dag er felagið undir hattinum hjá Mentir, sum eisini eigur Statoil í Føroyum.

Felagið setti tveir stórar tangar, sum taka 7.000 litrar hvør, upp við oljuhavnina í Fuglafirði og skipini, sum koma til bygdar at bunkra, økjast í tali.

Úr Fuglafiðri verður sagt, at umframt føroysk skip, sum brúka tungolju, er tað serliga teir stóru russisku trolararnir, sum fiska um okkara leiðir, ið bunkra á Fuglafirði.

Í stuttari viðmerking sigur Sigurd Simonsen, borgarstjóri í Fuglafirði, at pelagiska vinnan legði út við 50 miljónir krónur í verkætlanina, meðan kommununar partur við planering, bryggju og trygdargeira liggur um einar 20 miljónir krónur.

Nýggi stjórin í Faroe Bunkers, Niels Juel Nattestad, er uttanlands í løtuni.



# sum »plástur« fyri svartkjaft

sum hann hevur sent Sosialinum.

Hann sigur seg fegnast um, at landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, heldur uppskotið hjá Kristinu T. Larsen um royndarveiði eftir hvítingsbróðuri vera skilagott.

Kristina hevur nevniliga skotið upp at lata einum ídnaðarskipi royndarloyvi til at fiska hvítingsbróður í føroyskum sjógvi.

Fyrrverandi fiskimaðurin og reiðarin heldur, at vóru trupulleikar við íblanding av hýsuyngli í sínari tíð, tá veiðan eftir hvítingsbróðuri var steðgað, skuldi hetta slett ikki verið nakar trupulleiki í dag, nú skipini hava framkomnar skiljiristir.

- Hetta man vera einasti fiskastovnur yvirhøvur í norðurhøvum, sum fiskifrøðingar mæla til - ella ikki mæla frá – til at fiska eina ávísa nøgd av, men sum myndugleikarnir kortini ikki loyva.

Sigurd vísir á kjakið um, at tann smái fiskurin er føðin hjá størri fiski.

- Jú, teir størru fiskarnir eta teir smáu. Tað er ein náttúrulóg. Men hesi 30.000 tonsini av hvítingsbróðuri skulu so eisini hava at eta hvønn dag - og allarhelst eta teir burturav onkrum, ið annar fiskur skuldi etið. Hetta man tí vera ein spurningur um javnvág millum fiskasløgini, ið vit skulu raka fyri at fáa sum mest burturúr einari burðardyggari heildarveiðu.

Sigurd heldur, at hvítingsbróðurin eisini hevði verið eitt gott "plástur", nú svartkjaftakvotan er so nógv skerd.

Hann vísir á, at stór virðir liggja í teimum umleið 30.000 tonsunum av hvítingsbróðuri, sum kundu komið til sættis í Føroyum.

- Um alt mjølið og lýsið, ið fekst burturúr hvítingsbróðri, varð gjørt til laksafóður og bleiv brúkt í føroysku alivinnuni, hevði virðið av hesum verið umleið 150 miljónir krónur, sigur Sigurd Simonsen í lesarabrævinum.



*Sigurd Simonsen heldur, at Føroyar eiga at gera nýtslu av tilfeinginum, sum er í hvítingsbróðuri*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*